# UMSÓKN UM SKEINKILOYVI TIL STØK TILTØK

Umsóknir um skeinkiloyvi til støk tiltøk í summar, eiga at verða Loyvisnevndini í hendi innan 8. juni 2007.

Umsóknir skulu sendast til:

**Politistøðin í Tórshavn**
Att. Loyvisnevndin
J. Broncksgøta 17
Postboks 3018
110 Tórshavn

Saman við umsóknini skal sendast ein tekning, sum vísir økið har ætlanin er at skeinkja, tal av skeinkingarstøðum, umframt ein neyv lýsing av tiltakinum, herundir upp- og afturlating-artíðir.

***Loyvisnevndin***
*Anna Dam, form.*

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO
**HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO**

TÓRMÓÐUR DJURHUUS · JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD · JÓHAN J. LAMHAUGE
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR

# Starvsfólk til:
# INTERSPORT
# Tórshavn

**Søkt verður eftir lærlingi til Thomas Dam ítrótt í Tórshavn.**

Starvið fevnir um alt vanligt handilsarbeiði innan sølu av ítróttarútgerð. So ert tú ein m/k, sum hevur áhuga innan hetta økið, kunnu vit bjóða tær eina spennandi lærutíð hjá okkum

Thomas Dam Ítróttur er partur av Intersport- og Sport Direct samtakinum og hava vit 3 ítróttarhandlar. Umframt handilin í Tórshavn hava vit eisini ein á Glyvrum og ein í Klaksvík.

So ert tú ein fryntlig/ ur persónur við áræði og ikki ert bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur ert tú vælkomin at søkja hetta læru-pláss. Lærutíðin er 2 ár við HH prógvi og 3 ár við FHS prógvi.

Umsóknir við prógvum og viðmælum verða at senda til:

***Thomas Dam Ítróttur***
***Niels Finsensgøta 5***
***Boks 268***
***FO-110 Tórshavn***

**P/F THOMAS DAM ÍTRÓTTUR**
Niels Finsensgøta 5 · boks 268 · FO-110 Tórshavn

Hvalbiar
1973
skúli
850 Hvalba
tlf. 375083

# Varaskúlastjórastarv í Hvalbiar skúla

**Eitt starv sum varaskúlastjóri í Hvalbiar skúla verður lýst leyst frá 1. august 2007**

**Søkt verður eftir varaskúlastjóra, sum:**

- undir ábyrgd og í samstarvi við skúlastjóran skal taka lut í teirri fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluni av virksemi skúlans
- hevur góð samstarvsevnir, er fyrikomandi og loyalur
- er fúsur at taka á seg uppgávur í samstarvi við og eftir fyriskipan skúlastjórans.

**Harumframt skal varaskúlastjórin**

- vera næsti medarbeiðari skúlastjórans
- saman við skúlastjóranum átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- undir fráveru skúlastjórans hava ábyrgdina av leiðslu skúlans
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- saman við skúlastjóranum skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarin skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggj-armálaráðið og Føroya Lærarafelag og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann sum sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi mikudagin 6. juni kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið frá Elsu Birgittu P. Petersen, skúlastjóra á tlf. 375083.

Hvalbiar skúli hevur komandi skúlaár uml. 102 næmingar í 1. – 9.fl. og uml. 11 lærarar.

# Lutaíbúð í Keyp-mannahavn til sølu

Góð ljós 2-rúm lutaíbúð á Nørrebro til sølu.

Íbúðin er á 2. hædd, hon er 56m$^2$, hevur planka-gólv, og høgt er til loftið.

Lutaeigarin er limur í vælvirkandi lutafelag.

Kostnaðurin fyri lutin er um 950.000 kr.

Fasti kostnaðurin til lutafelagið er 2900 kr. um mánaðin.

Lutaíbúðin sæst á heimasíðu: nettrold.dk

**Eru tygum áhugað ringið 42 25 26.**

# Samfelagsstevnan í Klaksvík 2007

**Um Gud vil verða hesi møti í Klaksvík á hvítusunnu:**

**Í Betesda**
Fríggjadagin 25. mai:
kl. 20.00: Bønarmøti

**Í KÍ-høllini**
Leygardagin 26. mai:
kl. 19.00: Evangeliskt møti*
kl. 22.00: Opið hús

**Hvítusunnudag 27. mai:**
kl. 10.00: Minnismáltíð Harrans
kl. 12.30: Sunnudagsskúli
kl. 15.00: Uppbyggingarmøti*
kl. 19.00: Evangeliskt møti*
kl. 22.00: Opið hús

**2. Hvítusunnudag 28. mai:**
kl. 10.00: Uppbyggingarmøti
kl. 16.00: Uppbyggingarmøti*
kl. 17.30: Náttturði
kl. 19.00: Evangeliskt møti*

*Barnamøti verður í KÍ Cafe´ini.

**Verið hjartaliga vælkomin!**




# Móttøka

Í sambandi við at vit hava stovnað nýtt ráðgevandi verkfrøðingavirki bjóða vit til móttøku í hølum okkara á Heykavegi 6 B

**fríggjadagin 25. mai kl. 15-17.**

**Pætur Húsgarð og Bjarni Jakobsen**

PB CONSULT
RÁÐGEVANDI VERKFRØÐINGAR F.R.I.

Heykavegur 6 B • Postsmoga 1395 • FO-110 Tórshavn
Telefon: 30 82 00 • Faks: 30 82 01
Teldupostur pbc@pbc.fo • www.pbc.fo

PB-Consult er ráðgevandi verkfrøðingavirki, sum veitir ráðgeving innan HVS-skipanir, ventilatiónsskipanir, vatnveitingar og vatnreinsiverk, kloakkleiðingar og kloakkreinsiverk, fjarhitaskipanir, sprinklaraskipanir, køvigasskipanir, projekteringsleiðslu og byggileiðslu. Stovnarar eru Bjarni Jakobsen og Pætur Húsgarð, sum hava ávikavist 11- og 18 ára royndir frá ráðgevandi verkfrøðingavirkjum, bæði Føroyum og uttanlands.